# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 5
September 2010

ISSN 1603-0036



photo by imagea.org

13 posthús lata aftur

Ársins vakrasta 2009

Vinn 6000 evrur!

Jólini 2010

Posta

Hesi posthús lata aftur 30.12.2010:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | Eiði | 7. | Sandavágur |
| 2. | Fuglafjørður | 8. | Skopun |
| 3. | Gøta | 9. | Strendur |
| 4. | Hvalba | 10. | Sørvágur |
| 5. | Kollafjørður | 11. | Toftir |
| 6. | Leirvík | 12. | Vágur |
| | | 13. | Vestmanna |

# 13 posthús lata aftur

Tá postvirksemið í 2005 varð lagt í partafelag, bleiv dentur lagdur á, at posthús skuldi verða á ávísum plássum í Føroyum til ultimo 2010. Soleiðis varð lóguni frá 2005 um at leggja postvirksemið í partafelag ásett, at posthús skuldu vera á 21 plássum í Føroyum til ultimo 2010.

Longu í 2005 var greitt, at tørvurin á posthúsum fór at minka, tí posthústænasturnar fóru at verða avgreiddar á annan og meira tíðarhóskandi hátt, sohvørt sum tøkniliga menningin fór fram. Í áðurnevndu lóg varð tí ásett, at frá primo 2011 var bert neyðugt við posthúsum á 7 plássum í Føroyum.

Síðan postvirksemið varð lagt í partafelag, hevur Posta framhaldandi víðkað um nýtsluna av tøkni í tráðanini eftir at veita kundunum betri og betri tænastur.

Í 2008 setti Posta tær sokallaðu Posta Sjálv automatirnar upp 4 støð í landinum. Tað gjørdi, at kundin í størri mun sjálvur kundi gera av, nær hann ynskti at avgreiða síni postørindi.

Í 2009 setti Posta á stovn Posta Heima tænastuna, ið er at kalla eitt rullandi posthús, sum kundin kann fáa heim til sín. Kurérurin koyrir heim til kundan, og veitir honum alla vanligar posttænastur bæði á bygd og í bý.

Stutt eftir at Posta Heima tænastan var sett í verk, varð samstarvsavtala gjørd við handilsfyritøkurnar Samkeyp og Merko, ið eru matvøruhandlar við longum upplatingartíðum. Her kann kundin nú



Mynd: Miriam Hinz

avgreiða postørindi, sum t.d. brøv, tí har verða seld frímerki, brævbjálvar, stórir og smáir og postkassin hongur uttanfyri handilin. Tænastuna í Samkeyp og Merko handlunum rópa vit fyri Posta Her.

Týdningarmestu posthústænasturnar eru inngjøld og pakkaavheinting. Hesar verða í størri og størri mun avgreiddar umvegis heimabankan og Posta Heima tænastuna, soleiðis at alsamt færri vitjanir eru á posthúsunum.

Tíðin er búgvin til at minka talið av posthúsum í tráð við lóguna frá 2005 um at leggja postvirksemið í partafelag. Ultimo desember 2010 verða tí 13 posthús latin aftur, og tey eru:

1. Eiði
2. Fuglafjørður
3. Gøta
4. Hvalba
5. Kollafjørður
6. Leirvík
7. Sandavágur
8. Skopun
9. Strendur
10. Sørvágur
11. Toftir
12. Vágur
13. Vestmanna

Í hesum sambandi fáa frímerkjasavnarar møguleikan at bíleggja bjálvar við frímerki og síðstadagsstempli, dagfest 30.12.2010, frá omanfyrinevndu posthúsum. Sí bíleggingarlepan.




1




2




3

# Ársins vakrasta frímerki 2009

Frímerkjasavnarar kring allan heim hava atkvøtt millum føroysku frímerkini, ið vórðu givin út í 2009 og úrslitið gjørdist hetta:

Nr. 1 gjørdist frímerkið FO 672, ið avmyndar Leynar í kava. Ólavur Fredriksen hevur tikið myndina.

Nr. 2 gjørdist frímerkið FO 673 ið avmyndar tvær bládúgvur. Astrid Andreasen hevur teknað frímerkið.

Nr. 3 gjørdist smáarkið "Verjið pólar og jøklar" FO 659-660" Teknað hevur Edward Fuglø.

Hepnu vinnararnir eru:

1) Åke Peterson
Gnosjö, Svøríki

2) Luigi De Martin
Conegliano, Italia

3) Jacques Meyer
Lyon, Frakland

# Vinn 6.000 € !!




## Ver við í lutakastinum um 6.000 € ( uml. 45.000 kr.)







Nú hevur tú møguleikan at vinna 6.000 € (uml. 45.000 kr)

Tað einasta tú skalt gera er at fara inn á heimasíðuna www.sepacstamps.eu. og velja tað Sepac frímerkið sum tú heldur verða vakrast.

So ert tú við í einum lutakasti um 6.000 € ( uml.45.000 kr)

Tey føroysku frímerkini, ið eru við í kappingini eru FO 615 (Hoyvík) og FO672 (Leynar)

Í yvirlitinum hjá Sepac eru tey ávíkavist merkt sum nr 1 og nr. 12

Kappingin heldur fram til 30. oktober 2010, so tað ræður um at skunda sær!!

Frá vinstru: jólakort, jólaprýði, jólamerkini, ársmappa og árbók 2010




# Jólini 2010

## Jólamerki

Janus á Húsagarði hevur teknað ársins jólamerki, sum í ár avmynda føroyskt landslag við jólavættrum. Ein fitt jólasøga fæst eisini saman við jólamerkjaarkinum.

Avlopið av jólamerkjasøluni fer sum vanligt til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr

## Ársmappa

Ársmappan verður givin út í november. Hon er 235 x 202 mm til støddar, og í henni eru øll frímerkini og smáørkini, ið eru givin út í ár. Hefti og postgjaldsmerki eru ikki við í ársmappuni, sum verður seld fyri áljóðandi virði.
Ársmappan kostar 289,00 kr

## Árbók

Árbókin lýsir við greinum og vøkrum myndum allar ársins frímerkjaútgávur. Øll ársins frímerki og smáørk eru sett í lummar í árbókini, sum er A4 til støddar.

Postgjaldsmerkini eru ikki við í bókini.
Bókin fæst í tveimum útgávum: donsk/føroysk og ensk/týsk.
Árbókin kostar 330,00 kr.









## Jólaprýði

Fyri triðju ferð geva vit út einglar úr jólamerkjaarkinum í 2008 sum jólaprýði. Astrid Andreasen hevur sniðgivið. Jólaprýðið er úr messingi og lagt við 24 karat gulli. Gyltur snórur er festur í prýðið, so klárt er at heingja upp.

Einglarnir eru uml. 8 cm til støddar, og verða seldir í vakrari eskju - fimm ymiskir í hvørjari.

Jólaprýðið kostar 159,00 kr. settið, íroknað mvg.

## Jólakort

Í sambandi við jólamerkini gevur Posta eisini út fýra jólakort við somu myndevnum. Jólakortini eru dupult og verða tey seld saman við bjálvum.

Jólakortini kosta 25,00 kr settið.

# Nýggju postgjaldsmerkini 2010



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2010 Kappróður** |
| Útgávudagur: | 20.09.2010 |
| Virði: | 6,00 - 100,00 kr. |
| Myndevni: | Kappróður |
| Teknað: | Jóannes Lamhauge |
| Stødd: | 22,5 x 55,0 mm |
| Prentháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Post danmark, Danmark |




Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: Centraltrykkeriet, Danmark

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo